## DAGSINS MEINING

# Ymisk áhugamál

Tað var einki minni enn ein smeitur, at danska stjórnin kærdi málið um útflutningskvotuna av laksi til ES. Ásetingin av ein kvotu var so avgjørt til fyrimunar fyri føroysku alararnar. Kvotan fór at tryggja ein ávísan minstaprís og hevði tí gagnað føroyskum útflytarum. Tá uttanríksráðharrin var her á vitjan fyri stuttum, lat hann almenningin skilja, at hetta mál var eingin trupulleiki fyri stjórnina. Hesa fatan fekk landsstýrið og hesa somu fatna fekk pressan.

Men nú er so vent í holuni. Tað er komið í ljósmála, at samstundis sum uttanríksráðharrin á fundi við landsstýrið vissaði um, at her var eingin vandi, hava embætismenn í donsku stjórnini mælt til, at Danmark skuldi kæra avgerðina hjá ES nevndini um at áseta kvoturnar á norskan og føroyskan laks. Grundgevingin er tann, at ein kvotering fór at nerva donsk arbeiðspláss. Hetta tí at danskar fyritøkur kundu missa bíliga norska rávøru.

Málið er eitt gott dømi um ein álvarsaman veikleika við ríkisfelagsskapinum. Hesin veikleiki kemur fyri dagin, tá ið andsøgn er ímillum donsk og føroysk vinnulig áhugamál. Sama kann sigast um andsagnir ímillum donsk og føroysk politisk áhugamál. Tá so er, kemur danska stjórnin í tvístøðu. Hon skal røkja eitt nú donsk vinnulig áhugamál, men sum avvarandi av føroyskum uttanríksmálum skal stjórnin eisini røkja føroysk áhugamál. Henda støða kemur kanska ikki so ofta fyri, men hon kemur fyri so av og á, og tá hon kemur fyri, avdúkar støðan ein álvarsaman veikleika við ríkisfelagsskapinum.

Føroyskir myndugleikar kunnu ikki góðtaka, at danska stjórnin so at siga automatiskt velur síðu til frama fyri donsk áhugamál, hvørja ferð henda støða kemur upp. Landsstýrið eigur tí skjótast at taka hetta ítøkiloiga málið mál upp. Men landsstýrið eigur eisini at taka hetta mál upp sum eitt princippmál, tá farið verður undir at samráðast um at flyta myndugleika og heimildir á uttanríkispolitiska økinum frá donskum til føroyskan myndugleika. Landsstýrið eigur ikki at góðtaka ta støðu, sum nú er íkomin. Her er talan um eitt greitt lyftisbrot, sum danska stjórnin uttan drál eigur at fáa í rættlag aftur, og landsstýrið má gera sítt heimaarbeiða í hesum sambandi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Óseriøst stýri fyri Norðurlandahúsið

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**
*justinus@post.olivant.fo*



Herfyri var lýst eftir nýggjum stjóra í Norðurlandahúsinum, og onki er galið í tí. Okkara fremsti mentanardepil skal hava góða og skapandi leiðslu.

Starvslýsingin er óseriøs, og tað hevur hon verið seinastu 20 árini, og tað eigur at átalast, at ein so høgt mentaður stovnur, soleiðis beinleiðis, lumpar fólk.

Ivaleyst koma fleiri umsóknir til starvið, og tað fyrsta sum stýrið ger, er at taka tær føroysku frá. Tær verða ikki eingang viðgjørdar, uttanmun til hvussu góðar tær eru. Her er galdandi eitt slag av apartheid, ein óskrivað lóg sum sigur, at føroyingar kunnu ikki gerast stjórar í Norðurlandaráðnum.

Eg haldi, at hendan óskrivaða lóg er í fínasta lagi. Tað er uttan iva betri fyri føroyskt mentanarlív og andslív, at ein útlendingur stjórnar Norðurlandahúsinum í Føroyum. Endamálið fyri Norðurlandahúsið er minst líka nógv at fáa norðurlendskt mentanartilfar til Føroya

Tó kenni eg meg stoyttan av, at stýrið lumpar føroyingar í starvslýsingini. Tá føroyingar ikki kunnu gerast stjórar í Norðurlandahúsinum, so eigur tað at standa í lýsingini, at føroyingar skulu ikki søkja. Alt annað er óerligt.

Eg søkti einaferð fyri nógvum árum síðani. Nakað eftir at nýggi stjórin var settur, hitti eg ein av stýrislimunum, sum brúkti eina góða løtu at fortelja mær, hvussu góð mín umsókn hevði verið, men eg kundi líka so gott havt spart mær ómakin, tí føroyingar verða ikki settir sum stjórar í Norðurlandahúsinum. Eg var sjálvsagt ovurfegin um komplimentið um dygdina í míni starvslýsing, tað kundi eg jú brúka til alt møguligt, hevði hug at rodna og hyggja burtur. Eg kendi meg stoyttan, at orsøkin til at eg slett ikki var vigaður varð einans tí eg var føroyingur, og hevði einki við mínar kvalifikatiónir ella meg sum menniskja at gera.

Eg fari at ynskja nýggja stjóranum, tá hann einaferð kemur, góða eydnu við starvinum og fari at heita á stýrið um at hava reinar linjur. Stjóralýsingin í verandi líki lumpar fólk og tað kann ongantíð verða uppgávan hjá stýrinum fyri einum so høgt mentaðum stovni at lumpa fólk. Følsk reklama er revsiverd.

Næstuferð lýsingin kemur í bløðini eigur at standa við stórum stavum: Føroyingar skulu ikki ómaka sær at søkja, og komið so við einari erligari grundgeving fyri hví.

# Loysnir skulu finnast

**Henrik Old**
**Johan Dahl**





Í samband við tosið um álvarsligu støðuna við manglandi arbeiði í syðru helvt av Suðuroy, kann tað tykjast heldur friðarligt frá politiskari síðu.

Vit hava ikki hildið at rætta leiðin hevur verið at hvør í sínum lagi skrivar greinar um allar detaljur í teimum royndum, sum higartil eru gjørdar fyri at bøta um støðuna við teimum vantandi arbeiðsplássunum, men sjálvandi er rætt at lata fólk frætta, hvat gjørt er higartil í hesum trupla máli.

Nakað hevur verið fokusera uppá ein trímannabólk við einum limi frá hvørjum flokki í samgonguni, sum skuldi fylgja við og hava samband við landstýrið og løgmann, í teimum stigum ið tikin verða, so flokkanir í samgonguni í semju kunnu finna loysnir á hesum trupla máli.

Fyrsta stigið var tikið skjótt eftir at samgongan var skipað. Fundur var hildin í Tinganesi við leiðsluna og nevndarformann í Fiskavirking, fyri at fáa greiðu á, hvør ætlanin var við flakavirkinum í Vági, fyrrverandi Polarfrost. Hildið var at opnaði virkið aftur, sum vanligt

*Framhald á síðu 11*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Misskiljing ella manipulatión

**Kári Mortensen,**
*lærari í studentaskúlanum í Hoydølum.*



*Av misgávum kom ikki alt við kom ikki alt við í greinini í gjár, tí prenta vit greinina umaftur í dag*

Útvarpið bar mikukvøldið tey tíðindi, at Landsstýrið hevur givið Mentamálaráðnum boð um at fyrireika umfatandi broytingar í miðnámsútbúgvingunum.

Nú veit eg ikki, um útvarpið hevur gjørt sær ómak at bera tíðindini rætt - tað vil siga, um tað passar, at Landsstýrið grundað á danska gymnasiereformin heldur tíðina vera búna til ta heilt stóru fusiónina av miðnámsútbúgvingunum í skúladepil í Marknagili.

Fryktandi er tó fyri, at tíðindini eru røtt. Vit vita jú, at sterkar kreftir í politisku skipanini arbeiða fyri einum skúladepli í Marknagili. Og pínligt er tað, um politikkarar og embætisfólk í síni ivrigheit eftir at fáa gongd á aftur hálvavegna steðgaða projektið í Marknagili við vilja ella óvitandi misbrúka danska gymnasiereformin í eini "hensigten helliger midlet" herferð.

Niðanfyri standa nøkur brot um danska reformin, sum eru tikin úr Uddannelsesguiden.dk " Reform af de gymnasiale uddannelser"

Gymnasiereformen gælder højere forberedelseseksamen (hf), højere handelseksamen (hhx), højere teknisk eksamen (htx) og studentereksamen (stx).
De nye uddannelser er karakteriserede ved:
- styrket faglighed og progression
- styrket reel studiekompetence
- styrket samarbejde mellem fagene
- tidssvarende dannelsesbegreber
- fleksibilitet, herunder mulighed for uddannelsesskift efter 1/2 år uden tab af uddannelsestid
- 4 uddannelser med hver sin klare profil

Uddannelserne indgår i et samlet gymnasialt system, som er studieforberedende og almendannende, og som giver baggrund for optagelse på videregående uddannelser efter de regler, som er gældende for optagelse på de enkelte videregående uddannelser.
Grundforløb (1/2 år)
Grundforløbet består af sær- og flerfaglig undervisning i almene fag og profilfag - og med fokus på metode. Profilfagene er de fag, der er særegne for de 4 uddannelser. Grundforløbet skal forberede skiftet fra folkeskoleelev til gymnasieelev. Her stifter eleverne bekendtskab med en stor del af de fag, der senere vil indgå i studieretninger eller være mulige valgfag.
Et skift mellem hhx, htx og stx efter endt grundforløb er således muligt - men det er elevens eget ansvar at yde en ekstra faglig indsats på områder, hvor uddannelserne er forskellige som følge af deres forskellige profiler. Et skift efter grundforløbet er alene tænkt i de situationer, hvor valg af ungdomsuddannelse viser sig at være forkert.

Í Danmark er altso framvegis talan um 4 **ymiskar** útbúgvingar við 4 **ymiskum** hálvárs innleiðsluskeiðum. **Eitt skifti millum útbúgvingarnar er bara ætlað teimum, sum eftir eitt hálvt ár halda seg hava valt skeivt og ynskja at skifta útbúgving**. Haraftrat hevur næmingur, sum skiftir útbúgving sjálv/ur ábyrgd av at innheinta tað írestandi í nýggju útbúgvingini.

Eg vil við hesum staðiliga vísa á, at nýggja danska skipanin als ikki leggur upp til fusiónir av miðnámsútbúgvingum, sum summi við nógvum valdi kundu hugsað sær.

Pláss er ikki her at fara longur inn í tjakið um broytingar í miðnámsútbúgvingunum. Stutt kann sigast, at vit vita øll, at okkara miðnámsútbúgvingar (og ikki minst studentaskúlin) eru tætt knýttar at donsku útbúgvingunum. Tað er skilagott framvegis at hava hetta tilknýti, eisini at gera broytingar samsvarandi donskum broytingum og samstundis at gera broytingar á teimum økjunum, sum serliga viðvíkja okkara egnu viðurskiftum.

Kanska hava vit sum fakfólk ikki verið nóg góð at greiða frá okkara sjónarmiðum. Men boðskapurin hesuferð er: Verið varðin við bygnaðarbroytingum, blandið ikki orðini **bygningur** og **bygnaður** saman. Hyggið væl at verðandi miðnámsútbúgvingum og serliga teimum kvalitetum, tær hava hvør sær.

# Sambandskvinna umboðar Føroyar, Danmark og Grønland á NATO fundi

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Í døgunum 5. til 11. september verður árligi fundurin og kunningarferðin fyri parlamentarikarar hjá Norðuratlantisku verjusamgonguni NATO hildin í Turkalandi.

Evnini ið verða viðgjørd hesa ferð verða: støðan í Irak, Afghanistan og Mið Asia, og eisini stríðið móti yvirgangi, narko og menniskjasmugling standa á dagsskránni.

Umleið 35 umboð verða við á fundinum í Turkalandi. Summi av limalondunum hava tvey umboð meðan onnur hava eitt. Danmark telist millum londini, sum hava eitt umboð, og tað verður fólkatingslimurin Lisbeth L. Petersen, ið fer at umboða Danmark á fundinum. Á Fólkatingi er hon limur í tingbólkinum hjá Venstre, og tað er ígjøgnum tað samstarvið, at hon er vald at vera umboð fyri ríkisfelagsskapin á NATO-fundinum.

Sambandsflokkurin fegnast um, at ein føroyingur umboðar ríkið í millumtjóða samstarvi. Flokkurin gongur inn fyri, at uttanríkis- og verjumál eru felagsmál fyri alt ríkið, og tí er tað nátúrligt, at eisini føroyskir politikarar átaka sær ein virknan leiklut á hesum øki.

Tað eigur at vera uppgávan hjá føroyingum at greiða umheiminum frá, hvørji vit eru, og hvat vit hava at bjóða. Frægastu úrslitini og størstu ávirkanina fáa vit við greiðum reglum og góðum samstarvi til gagns fyri báðar partar í einum vælvirkandi ríkisfelagsskapi.

Samstarv er vegurin fram!

*Framhald av síðu 10*

fiskavirki, so var tað nakað, sum hevði ført til eina skjóta og munagóða broyting í støðuni.

Hesin fundur var hildin í mars mánaða. Til staðar vóru løgmaður, landsstýrismaðurin í vinnumálum og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum umframt 3 mannabólkurin. Á tí fundinum fingu vit fatan av, at byrja bleiv at rigga til á fyrrverandi Polarfrost stutt eftir páskir.

Uttan at fara í smálutir so mugu vit tíverri ásanna at so bleiv ikki. Ongin kann góðtaka at hettar fyrr so væla virkið framhaldandi skal standa, sum tað hevur gjørt so at siga samanhangandi seinastu nógvu árini, við tí úrslitið, sum vit kenna alt ov gott.

Fimm mánaðar eru nú farnir við stillstandi og er tí næsta stig tikið. Løgmaður segði í løgtinginum onsdagin at greiða skal fáast á, um virkið framhaldandi skal vera verðandi undir teimum eigaraviðurskiftum, tað nú er undir ella um onnur loysn skal finnast. Tann viðgerðin byrjar í næstu viku.

Landsstýrið hevur eisini fyri nøkrum døgum síðani havt fund við borgarstjóran í Vági um støðuna.

Ongin løtt loysn er, men landsstýrið og samgongan hava ásannað at núverandi støðan kann ikki halda fram.

Tað at fólkaflokkurin, sum ikki hevur tingmann í Suðuroynni er so positivur fyri eini loysn ger, at vit trúgva uppá at funnin verður ein varandi loysn á hesum stóra trupuleika.

Nevnast kann eisini, at í hesum døgum kemur nýggj kunngerð í gildi, sum bøtir munandi um kostnaðin av fiskaflutningi til og úr Suðuroynni. Hetta fer at lætta um hjá smærru virkjunum, sum vónandi fáa gongd á aftur.

Rætt er at nevna her at semja er fingin við landsstýrismannin í vinnumálum Bjarna Djurholm, at avsettar vera minst 35 mió. til tunnilsgerð millum Øravík og Hov á fíggjarlógaruppskotinum, sum framlagt verður síðst í hesum mánaðinum. Sostatt kann hetta arbeiði, sum vit hava longst nógv eftir, byrja stutt eftir nýggjár, og eigur landsstýrismaðurin eina tøkk fyri sín positiva vilja fyri hesum arbeiði hesar mánaðirnar vit hava samstarva.

Sjálvandi skulu onnur stig takast fyri at rætta skútuna, tað verið seg arbeiðspláss, sum ikki eru knýtt at fiskivinnuni, og eru ymiskar hugsanir um tað, men umráðandi er at hettar verður gjørt í sátt og semju.

Vit hava staðfest at samgongan hevur vilja til at bøta um støðuna hjá vinnuni við at gera karmarnar hjá vinnununi soleiðis, at vinnulívi kann fóta sær aftur, umframt tey tiltøk Vágs kommuna sjálv ger á havnalagnum.

Vit høvdu ynskt at tað gekk skjótari at fáa viðurskiftini í rættlag, men vit eru sannførdir um at loysnir verða funnar, sum verða oynni til gagns.

# Djurholm umber seg

**TÍÐINDASKRIV**
*Vinnumálaráðið*

Fríggjadagin tann 20. august 2004 helt navnframi Bjørn Lomborg almennan fyrilestur um orku, umhvørvi og búskap í Norðurlandahúsinum kl. 14.00. Hesin fyrilestur varð hildin í sambandi við, at arbeitt verður við at orða ein yvirskipaðan orkupolitikk fyri Føroyar.

Umframt at fyrilesturin var almennur, hevði eg sum landsstýrismaður í vinnumálum eisini sent innbjóðingar út til einstakar gestir, og vórðu setur umbiðin til hesar. Vegna stóra áhugan fyri fyrilestrinum, vórðu tey umbidnu setrini, ið vóru eftir kl. 14.00, latin øðrum.

Tá fyrilesturin byrjaði kl. 14.00, var salurin fullur, og lótu duravørðarnir hjá Norðurlandahúsinum dyrnar aftur av trygdarávum. Hetta hevði tí óhepnu avleiðing, at nøkur av teimum, ið høvdu fingið innbjóðing, og komu niðan í Norðurlandahúsið eftir kl. 14.00, ikki sluppu inn. Hetta harmast vit um, og vilja vit hervið biða innbodnu gestirnar um umbering fyri hetta.

Somuleiðis harmast Vinnumálaráðið um øll tykkum, ið sýndu fyrilestrinum áhuga men komu á læstar dyr vegna fullsettan sal.

Vónandi fáa tit høvi at verða við til onkran av teimum seinru fyrilestrunum, ið Vinnumálaráðið eftir ætlan fer at skipa fyri.

**Vinaliga**
**Bjarni Djurholm**